Sálarligur ræðuleikur í Atlantis:

# Øvundjúka og hevnd

**Ótrúskapur, øvundsjúka og barndómsminni, vit øll helst vilja gloyma, verða grivin fram í nýggja sálarliga ræðuleikinum "Vinkonur"**

*Á ein hátt er "Vinkonur" ein leikur, ið meir enn aðrir verður til, meðan hann verður spældur. Vit fáa lítið og onki at vita um tær tríggjar kvinnurnar frammanundan, og ongir eykaleikarar eru at lýsa høvuðspersónarnar*

SJÓNLEIKUR
*Anna V. Ellingsgaard*
*ave@post.olivant.fo*



Í hesum døgum leggja 3 kvinnuligir leikarar í Klaksvíkar Sjónleikarafelag seinastu hond á eina heldur øðrvísi sjónleikaætlan. Tað munnu vera eini tvey ár síðani ein av teimum var við til at taka stig til hendan leikin, har leikarnir sjálvir hava valt leik, leikarar og ásett tíðarætlanina. Hesa tíðina hevur leikurin so at siga livað sítt egna lív við síðuna av leikskránni hjá sjónleikarafelagnum annars. Leikarnir hava vant, tá tær hava haft tíð og ikki fyrr enn aftaná jól, avgjørdu tær at fáa ein leikstjóra við í ætlanina.

Saman við Biritu Mohr, leikstjóra, er ætlanin nú komin so langt ávegis, at dagurin fyri frumframførsluna er ásettur. Leikurin hevur fingi heitið "Vinkonur" og verður framførdur fyrstu ferð í Atlantis 27. mars.

Tað er bretski leikstjórin og leikhøvundurin Tamsin Oglesby, ið hevur skrivað leikin, sum hevur fingið framúr góð ummæli aðrastaðni.

### Finst nakar sannleiki?

Tá leikurin byrjar, eru tær báðar gomlu vinkonurnar Em og Bee júst komnar til eitt hugnaligt, gamalt hús í Suðurfraklandi. Tær hava ikki sæð hvørja aðra í mong ár, og lagt er upp til eitt hugnaligt vinkonukvøld við góðum, gomlum minnum. Og minnini verða eisini tikin fram, tey eru bara ikki tey somu hjá teimum báðum, sjálvt um hendingarnar eru tær somu. Tá so triðja vinkonan Chris kemur upp í leikin, hevur hon enn eina útgávu av fortíðini við sær. Minnini verða spøkilisi í ymsum hami, hugnaliga kvøldið gerst ein marra og sannleikin otar seg spakuliga út av pallinum, út til áskoðaran at avgerða ella …? Leikurin fær ein skakandi og óvanliga ógvusligan enda, ið ikki fær verðið øðrvísi, tá menniskju verða sorlað undir sálarligum trýsti.

### Náðileyst

Sjálvt um mátin, tær tríggjar, Em, Bee og Chris, fara hvør við aðari, oftast er bæði ráur og óndskapsfullur, kenna vit tær allaflestu støðurnar aftur frá okkum sjálvum og okkara egna barndómi. Løturnar, har vit vórðu fryst úti ella vóru við til at frysta onkran annan úti frá vinarskaranum. Sælu kensluna av at vera tann best umtókta av øllum í flokkinum og ræðsluna, tá onkur hótti við at taka leiklutin frá tær. Samansvørjingar, lygnir, slatur, smikur - alt tað, ið fær maktstríðið millum børn at forfylgja okkum langt inn í vaksna lívið, verður grivið fram í "Vinkonur". Í so máta er leikurin náðileyst realistiskur, tí tey flestu av okkum vilja helst gloyma hendan partin av barndóminum, sigur Birita Mohr.

### Tú kennir "typuna".

Á ein hátt er "Vinkonur" ein leikur, ið meir enn aðrir verður til, meðan hann verður spældur. Vit fáa lítið og onki at vita um tær tríggjar kvinnurnar frammanundan, og ongir eykaleikarar eru at lýsa høvuðspersónarnar.

Tað eru tær tríggjar Jakobina Joensen, Eyð Matras og Jacobina Heinesen, ið fáa lív í hesar loyndarfullu kvinnurnar á pallinum. Jakobina verður til Bee, barnleysa karrierukvinnan, ið altið er í verjustøðu, Eyð hevur leiklutin sum Chris, tann óstøðuga, ið roynir at krøkja seg fasta í ein farnan ungdóm, meðan Jacobina átekur sær leiklutin sum semingskvinnan Em, ið ger alt fyri at glatta út, tá okkurt er áfatt.

Eg havi verið óvanliga heppin við hesum leikarnum, sigur Birita Mohr. Tær høvdu sjálvar valt leiklutirnir, áðrenn eg kom inn í myndina, men fyri meg var tað ongantíð nakar ivi. Hvør sær hava tær júst tað, sum skal til, fyri at endurgeva júst hesar tríggjar væl kendu kvinnutypirnar.

### Sálarligur ræðuleikur

Størsta avbjóðingin við at leikstjórna ein sálarligan ræðuleik, sum hendan, er at fáa alt tað ósagda fram, sigur Birita. Tað er ikki nokk at leikarin minnist, hvat hon skalt siga og nær. Hvørja einastu ferð leikarnir opna munnin, skulu tær vita akkurát hví, tær siga júst handan setningin ella hatta orðið. Leikurin er á tremur við undirtýdningum og tilsipingum, sum bara eg og leikarnir kenna týdningin av. Um áskoðarin skal hava ein kjans fyri at vita, hvat í grundini gongur fyri seg millum hesar vinkonurnar, mugu leikarnir leggja allan sín kropp í leiklutin. Eitt eygnabrá, ein rørsla ,ein lítil broyting í tónalegu - hvør einasti lítil smálutur kann verða avgerandi fyri, um tilsipingarnar raka, har tær skulu.

"Vinkonur" er eisini ein avbjóðing fyri áskoðaran. Hvørja ferð tú heldur teg vita, hvussu hendan søgan í veruleikanum hongum saman, kemur ein nýggj útgáva av sannleikanum á borðið, og áskoðarin má hugsa seg um einaferð afturat.

Og tað var eisini eitt avgjørt ynski frá leikarnum: Ein leik ið, gevur áskoðaranum okkurt at hugsa um, sigur Birita Mohr, leikstjóri.



*"Vinkonur" er eisini ein avbjóðing fyri áskoðaran. Hvørja ferð tú heldur teg vita, hvussu hendan søgan í veruleikanum hongum saman, kemur ein nýggj útgáva av sannleikanum á borðið, og áskoðarin má hugsa seg um einaferð afturat*



**ROVER 827 COUPE DE LUXE AUTOMATIC**
Árg Apr-98, Km 28.000. Sera vælhildin Top modell: Bert koyrt 28.000 km Klimaanlegg- Leðurinntrekk- Sóltak- El. rútar- El. spegl- Centrallás-Radio-Alufelgur-Spoylarar v.m.. Kr. 220.000.



**ROVER 620 SI**
Árg Jun-99, Km 81.000. Sera vælhildin: Aircondition- Alufelgur-Fjarstýrt centrallás- El-rútar-El-spegl v.hita. C.D.Anlegg- Sleipikrók v.m. Kr. 158.000.



**TOYOTA COROLLA 1.6 16 V EFI HATCHBACK**
Árg 23-Jul-91, Km 164.000. Radio v.Bandspælara og C.D. Box Sóltak- Spoylara v.m. Kr. 38.000.



**SUBARU LEGACY 2.0 GL AUTOMATIC**
Árg 06 Sept. 1995, Km 96.000. Sera vælhildin: Centrallás-El-rútar-El-spegl- Radio v.bandspælara v.m. eyka tectylviðgjørdur. Kr. 78.000.



**KIA SEPHIA 1.5 GTX**
Árg Mar-97, Km 152.000. Fjarðstýrt centrallás-El.rútar-El-spegl-Spoylara aftan- Alufelgur- v.m. Tilboð uttan bil í býti kr. 56.000. Kr. 66.000.



**SUBARU LEGACY 2.0 GL**
Árg 03 Marts 1993, Km 82.000. Sera vælhildin: El-sóltak- Centrallás- El-rútar- El-spegl- Radio v.bandspælara v.m. tectylviðgjørdur 3 hvørt ár 1.eigari. Kr. 60.000



DU300
**FORD ESCORT STATIONCAR 1.8 TURBO DIESEL**
Árg Okt. 1997, Km 159.000. El-rútar.fr.- Valnød Instrumentbretti-Takboylar- Sleipikrók v.m. Kr. 66.000

Pf. D. B. Bilar
**Jónas Broncksgøta 15**
**Tel. 310600 - Fax 310650**



## UTTAN ÚR HEIMI



*Tann 14. oktober skal John Allen Muhammad avrættast*

# Sníkiskjútti fekk deyðadóm

**Tann 43 ára gamli John Allen Muhammad, sum myrdi fleiri fólk á Washington-leiðini í oktober í 2002, er dømdur til deyða.**

REVSING
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Nevningarnir í Virginia vóru ikki í iva um, at John Allen Muhammad var sníkiskjúttin, sum herjaði á Washington-leiðini á heysti í 2002. Í rættinum var hann ákærdur fyri at hava skotið Dean Howard Meyers, sum var í ferð við at fylla tangan á bili sínum, tá hann bleiv skotin.

Dean Howard Meyers var ein av teimum tíggju, sum John Allen Muhammad og hjálparmaður hansara, Lee Boyd Malvo, skutu. Tann 19 ára gamli Malvo hevur fingið lívlanga fongsulsrevsing.

Undir rættarmálinum helt John Allen Muhammad uppá, at hann var ósekur, og verjarnir mæltu rættinum frá at døma hann til deyða. Men LeRoy Millette, dómari, staðfesti í úrskurðinum, at maðurin hevur uppiborið deyðarevsing.

# Sharon til reiðar at hitta Qurie

**Ísraelski forsætisráðharin, Ariel Sharon, skal ætlandi hitta palestinska forsætisráðharran, Ahmed Qurie, í næstu viku**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Fleiri ferðir hevur ljóðað, at Sharon og Qurie skuldu hittast, men hvørja ferð teir eru vorðnir samdir um ein fund, hava víðgongdir palestinar søkt at málum í Ísrael við tí úrsliti, at Sharon hevur avlýst fundirnar.

Í gjár upplýsti ein ísraelsk kelda, at nú eru teir aftur vorðnir samdir um at hittast. Ahmed Qurie, sum vitjaði í Noregi týsdagin, váttaði á fundi við norsku leiðararnar, at partarnir royndu at fáa ein fund í lag.

Eydnast tað at fáa teir báðar til fundarborðið, verður tað fyrsti fundurin teirra millum, síðani Qurie tók við sum palestinskur forsætisráðharri í oktober í fjør. Undanmaður hansara, Mahmoud Abbas, hitti Sharon fleiri ferðir.

Ísraelska blaðið Haaretz skrivaði í gjár, at fundurin ímillum Sharon og Qurie verður helst týsdagin í næstu viku. Blaðið visti eisini at siga, at embætismenn hjá báðum pørtum eru í ferð við at leggja eina skrá fyri fundin.

### Einki samband

Ísrael sleit alt samband við teir palestinsku myndugleikarnar í august í fjør, tá ein palestinsk sjálvmorðsatsókn kravdi meiri enn tjúgu mannalív í Jerusalem. Ariel Sharon hevur síðani sagt fleiri ferðir, at hann vil einki hava við teir palestinsku myndugleikarnar at gera, tí teir gera ikki nóg mikið fyri at forða víðgongdum palestinum at søkja at málum í Ísrael.

Palestinsku myndugleikarnir hava svarað, at teir duga ikki at síggja nakra orsøk til at samráðast við ísraelsku leiðsluna, so leingi Ísrael heldur fram við arbeiðinum at byggja tann umstrídda trygdarmúrin, sum palestinar siga vera ein hersetingarmúr.






*Ariel Sharon og Ahmed Qurie hittast ætlandu fyri fyrstu ferð næsta týsdag*

# Horvin á veg til Norðpólin

**Franska kvinnan Dominick Arduin ætlaði sær at gerast tann fyrsta kvinnan, sum megnaði at røkka Norðpólinum uttan hjálp frá øðrum. Eingin hevur frætt frá henni síðani seinasta fríggjadag**

PÓLFERÐ
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tann 43 ára gamla Domick Arduin fó úr Norðursibiria við kós ímóti Norðpólinum seinasta hósdag. Tað gjørdu fýra onnur eisini, men trý teirra máttu sleppa ætlanini, tá tey komu til opið hav.

Tað vildu Dominick Arduin og ein fransmaður, Frédéric Chamard-Boudet, ikki. Tey valdu at rógva tvørturum, men Frédéric mátti kortini gevast. Men Dominick helt fram. Seinasta fríggjadag boðaði hon frá, at hon var farin til árarnar, men síðani hevur eingin hoyrt frá henni. Tey serkønu hava ikki góðar vónir um hana. Tað frystir 40 stig har á leiðini.

Dominick Arduin hevur búð í Norðurfinnlandi seinastu árini. Hon royndi eisini at ganga til Norðpólin í fjør, men endaði á sjónum, so ein tyrla mátti taka hana upp. Ta ferðina misti hon allar tærnar.